SUNDA KOMMUNA

Tlf: 298 667271
Fax: 298 407270
www.sunda.fo
mail: sunda@sunda.fo

Oyrarbakkavegur 3
Postboks 10
FO 400 Oyrarbakki

Jóhan Jógvansson
Saksunarvegur 1
436 Saksun

Dato: 3. februar 2020

J.nr.:: 2020-0099-089-5
(at tilskila í svari)

Viðgjørt:

Tygara skriv:

**Víst verður til umbøn tann 27. januar 2020 um innlit í byggimál í Saksun**

Umbøn um innlit er gingin á møti. Skjølini kunnu heintast á kommunuskrivstovuni.

Málið byrjaði í august 2018 við umsókn um grundstykki frá felag, sum hevði ætlan um at byggja hús í Saksun. Ætlanin og umsóknin varð viðgjørd í Tekniskunevnd 14. august 2018 og 9. oktober 2018. Málið varð síðan viðgjørt í Fíggjarnevndini 20. november 2018 og var endaliga samtykt í býráðnum 26. november 2018.

Viðvíkjandi kloakkskipan er ætlanin at húsini skulu hava 3-rúms tanga, sum verður knýttur í eina høvuðskloakk, tá ein slík er klár. Høvuðskloakkin verður ein seyriskipan ella ein kloakkskipan, sum verður førd út á streymasjógv. Endalig støða til hetta fyriliggur ikki í løtuni.

Vinarliga

Sunda kommuna

Heðin Zachariasen
borgarstjóri

**Skjal 1**

## Eyðun Kjølbro

**Fra:** Barbara Holm <ebarbaraholm@gmail.com>
**Sendt:** mánadagur, 6. august 2018 11:57
**Til:** Heðin Zachariasen; Sunda kommuna
**Emne:** Umbøn um grundstykki í kommununi og fund um byggiverkætlan

Góðu tit

Eins og avtalað við Heðin Zachariassen sendi eg her ein skrivligan fyrispurning um grundstykki til summarhús í kommununi/Saksun. Somuleiðis vilja vit við hesum umbiðja fund við umboð fyri býráðið um ætlanina.

Seinastu vikurnar hevur undirritaða verið í sambandi við borgarstjóran um størri verkætlan, sum er klár at seta í gongd, tá ið rætta grundøkið er funnið. Talan er um verkætlan við upp til 25 summarhúsum, tó at hetta talið kann minka og veksa alt eftir tørvi.

Stutt kann sigast um summarhúsini, at tey eru ein samanrenning millum tað gamla, føroyska sniðið uttan á, og innaní tað praktiska og modernaða. Sostatt er ætlanin at byggja ein nýggjan býling, sum líkist tí gamla, sum vit kenna eitt nú frá av Reyni í Havn og frá nýggjaru summarhúsunum við Gjógv.

Viðfest eru nakrar lítlar myndir, sum kunnu geva tykkum eina fatan av, hvussu húsini koma at síggja út. Vit kundu við hesum útgangsstøðinum hugsa okkum at spurt um fund við teknisku nevnd og býráðið annars, har vit fáa høvi at greiða frá verkætlanini og tosa við politiska myndugleikan um, hvat ber til í kommununi.

Í samrøðu við borgarstjóran hava vit umrøtt fleiri ymisk øki í kommununi, men tað er eingin loyna, at tað er grundøkið í Saksun, sum hevur størstan áhuga.

At enda kann eg leggja aftrat, at okkara toymið, sum inniheldur tann fakkunnleika, sum krevst til slíka verkætlan, er til reiðar at fara í gongd, so skjótt grundstykki og loyvi er komið upp á pláss.

Við vón um vælvild og fund í nærmastu framtíð

Vegna felagið/

Barbara Holm

211126

Skjal 28

Tlf: 298 667271
Fax: 298 407270
www.sunda.fo
mail: sunda@sunda.fo

Oyrarbakkavegur 3
Postboks 10
FO 400 Oyrarbakki

19. juli 2019

Umsókn um økið til byggiverkætlan - summarhús - Barbara Holm

J.nr: 2018-0410-316-28

Viðgjørt: Eyðun Kjølbro

# Telefonreferat

Barbara Holm (211146) ringdi eftir at hava móttikið svar frá BST 11. juni 2019 um at BST bert selur kommununa.

Hvat skal henda víðari? Barbara metir at kommunan hevur bundið seg at selja til sín, við tað at verkætlanin er viðgjørd politiskt (býráðssamtykt 26.11.2018).

Eg greiddi frá trupuleikanum í mun til kunngerð um alment útboð av kommunalari fastogn. At vit mugu fáa eina løgfrøðisliga meting av møguleikunum.

Barbara nevndi eisini aðrar møguleikar, eitt nú langtíðarleigu. Hetta taka vit við í spurningin til løgfrøðingin.

EK

**Skjal 29**

## Eyðun Kjølbro

**Fra:** Djóni Thomassen <djoni@advokat.fo>
**Sendt:** mánadagur, 15. juli 2019 19:17
**Til:** Eyðun Kjølbro
**Cc:** Djóni Thomassen
**Emne:** Summarhúsbygging í Saksun [J.nr. 2019194 DT]

Hey Eyðun,

Tú spurdi um møguleikar í sambandi við summarhúsabygging í Saksun.

Um jarðarstykkið er omanfyri 300 $m^2$ skal tað bjóðast alment út um man ikki fær undantak. Tað er ásett við kunngerð. Tað skal fyriliggja ein saklig og serlig grundgeving, um undantak skal gevast.

Eg meti, at tann rætta loysnin er, at kommunan bjóðar jarðarstykkið út alment fyri ein fastan prís til eina kapping um besta prosjekt.

Eg meti ikki, at tað er haldgóð loysn at kommunan bjóðar jarðarstykkið út við so stuttari freist og við so løgnum/hørðum treytum, at tað er illusoriskt hjá nøkrum at bjóða uppá jarðarstykkið uttan so, at man frammanundan hevði møguleika at fyrireika seg uppá at bjóða.

Freistin kann ikki verða styttri enn 14 dagar, sí somu kunngerð.

Ein møguleiki sum kann hugsast er, at kommunan leigar jarðarstykkið út til ein persón ella fyritøku í eitt longri tíðarskeið. Grundgevingini fyri at leiga jarðarstykkið út skal verða saklig og treytirnar í leigusáttmála skulu verða sakligar.

Tað er vanligt at leiga jørð við havnaløg út við langtíðarleigusáttmála. Tað er sakligt, tí havnir broytast, verða útbygdar vm. og kommunan skal ikki avmarkast av ognarrætti hjá einstalingum og fyritøkum. Tað er vælsaktans ikki tað sama sum ger seg galdandi í sambandi við bygging av summarhúsum í Saksun.

Eg eri tøkur, um spurningar ella ivamál eru.

Virðingarmest / Best regards


Djóni Thomassen

Advokatur LL.M.

Law Firm Hansen Thomassen Vinther

Undir Bryggjubakka 21, Box 106

FO-110 Tórshavn, Faroe Islands

T +298 359595

M +298 239595

**Skjal 30**

SUNDA KOMMUNA

Tlf: 298 667271
Fax: 298 407270
www.sunda.fo
mail: sunda@sunda.fo

Oyrarbakkavegur 3
Postboks 10
FO 400 Oyrarbakki

19. august 2019

Umsókn um økið til byggiverkætlan - summarhús - Barbara Holm

J.nr: 2018-0410-316-30

Viðgjørt: Eyðun Kjølbro

Notat

Innanhýsis telefonfundir 25. juli og 5. august millum undirritaða og borgarstjóran.
Grundað á

- at talan er um ætlan, sum byrjar við at umsøkjarin vendir sær til kommununa
- at talan er um lendi, sum kommunan ikki frammanundan eigur
- viðgerðina í tekniskunevnd 09.10.2018 og fíggjarnevndini 20.11.2018
- at býráðið hevur samtykt 26.11.2018 at ganga umsóknini á møti um at selja teimum økið

so avger borgarstjórin, at ætlanin verður framd, sum upprunaliga ætlað og samsvarandi samtyktini, soleiðis at kommunan keypir lendið og selir umsøkjaranum tað.

EK

**Skjal 31**

SUNDA KOMMUNA

Tlf: 298 667271
Fax: 298 407270
www.sunda.fo
mail: sunda@sunda.fo

Oyrarbakkavegur 3
Postboks 10
FO 400 Oyrarbakki

19. august 2019

Umsókn um økið til byggiverkætlan - summarhús - Barbara Holm

J.nr: 2018-0410-316-31

Viðgjørt: Eyðun Kjølbro

Telefonreferat 5. aug 2019

Barbara frá P/F Svartá undir stovnan ringdi í samband við status í málinum. Eg boðaði frá at avgjørt er at kommunan keypir lendið og selur teimum tað. Avtalur mugu gerast, so avtalurnar millum BST/SK og millum SK/Barbaru ganga hond-í-hond, so ætlanin ikki ber útreiðslur við sær fyri kommununa.

EK